# ítróttur

Nr. 132 • leygardagur • 13. juli 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Dreymurin er eitt 10–mannafar

**Men tað tykist vera langt frá dreymi og til veruleika, tí í Vágum hava mannfólkini ikki luttikið yvirhøvur í kappróðrinum í summar**

VÁGAR OG KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*



*Úr Vágunum droyma tey um, at oyggin í komandi tíðum fær eitt 10-mannafar*

Bara fimm 10–mannafør hava luttikið í teimum fýra FM kappingunum, sum hava verið. Teir somu fimm bátarnir fara at luttaka í Miðvági í dag, og tað hevur so við sær, at tað eisini verða hesir bátarnir, sum fara at hava rætt til at luttaka í ólavsøkuróðrinum. Bátarnir eru Klaksvíkingur, Eysturoyingur, Nólsoyingur, Havnarbáturin og Vestmenningurin.

At tað bara eru omanfyri nevndu pláss og øki, sum eru umboðað í tí, sum ofta verður mett at vera størsta avbjóðingin at luttaka og vinna í, ber kortini ikki boð um, at áhugin fyri 10–mannaførunum ikki er aðra staðni í landinum.

Sambært luttøkulistan hjá Róðrarsambandinum fyri í ár, so vórðu Kjølur, Suðuroyingur og Vágbingur meldaðir til kappingina. Teir hava kortini ikki luttikið. Tá tað var greitt, at tað ikki fór at eydnast at manna hesar bátarnir, vórðu feløgini noydd at frámelda, og so gjørdist dreymurin ikki til veruleika – í hvussu so er ikki í hesum umfarinum.

## Upp og niður við FS Vágum

Í fótbólti hava teir vesturi í Vágum síðani 1994 staðið saman um FS Vágar. Tað hava teir gjørt, tí teir undir kreppuni ásannaðu, at tað fór ongantíð at bera til hjá SÍ, MB og SÍF hvørt í sínum lagi at røkka upp ímillum tey allar bestu. Royndin við FS Vágum hevur onkuntíð kenst trilvandi. Nú er FS Vágar í 2. deild, men tað gongst væl, og eingin, sum hevur við FS Vágar at gera, ivast í, at hetta er rætta konseptið. Tað er ikki talingur um at fara frá oyggjafelagnum og til bygdafeløgini aftur – í hvussu so er ikki, um málið skal vera at vera við ímillum tey bestu.

Í kappróðri er eingin yvirbygningur í Vágum, men har hevur tað kortini verið soleiðis, at fólk úr fleiri bygdum eru við til at manna bátarnar. Her verður hugsað um gentubátarnar Ørnina úr Sandavági, Frúnna úr Miðvági og Dúgvuna úr Sørvági og 6–mannafarið hjá miðvingum, sum eitur Riddarin. Tað er eisini mannað við kvinnum, og kvinnurnar í Vágum hava staðið seg so mikið væl, at tær kappast við tær í Klaksvík um at vera næstar eftir Jarnbard.

Í undanfarnu róðrunum hevur eingin bátur úr Vágum verið mannaður við monnum. Á vestanstevnuni í Miðvági í dag fara menn at manna Riddaran, men tað verður mest fyri at vera við í heimasjógvi. Áhugin at rógva kapp er ikki so stórur millum mannfólkini í Vágum, at tey hava megnað at manna nakran bát, sum hevur verið førur fyri at taka lut í FM kappingini.

## Dreymurin

Men formaðurin í Miðvágs Róðrarfelag veit at siga okkum, at áhugin fyri kappróðri er ikki heilt sørur millum mannfólkini í Vágum:

– Tað verður av og á tosað um at fáa eitt 10–mannafar. Teir, sum royna at birta uppundir tað takið, halda, at eitt 10–mannafar hevði havt við sær, at áhugin, sum er fyri kappróðri í oynni, hevði sást aftur í, at tað hevði borið til at manna eitt 10–mannafar, sigur Hans Jákup Jacobsen, formaður í Miðvágs Róðrarfelag.

Hann hevur ikki nakað boð uppá, hvussu ein sovorðin bátur skuldi verið nevndur, men vit kunnu ditta okkum at skjóta upp, at tað hevði verið hugaligt, um eitt 10–mannafar, sum bar navnið Vágabáturin, kappaðist við klaksvíkingar, eysturoyingar, havnarmenn, nólsoyingar og vestmenningar.

Hans Jákup Jacobsen heldur, at veruleikin vísir, at tað er langt inntil dreymurin hjá teimum omanfyri nevndu verður veruleiki:

– Í vár var ætlanin at manna Miðving. Hann var flotaður einar tvær ferðir. Men báðu ferðirnar miseydnaðust royndirnar, tí onkrir fóru av. Teir hildu seg ikki hava tíð ella umstøður at venja so nógv, og tískil stendur 8–mannafarið í neystinum. Tað eydnaðist heldur ikki at manna Riddaran, og tá tað ikki eydnaðist at manna 6–mannafarið, so haldi eg, at tað, tíverri, er langt inntil dreymurin um 10–mannafarið verður veruleiki. Tað hevði helst verið soleiðis, at áhugin fyri at rógva hevði verið øktur, um vit fingu eitt 10–mannafar, men tað skal helst vera ein nátúrlig menning, er skilagóða staðfestingin hjá formanninum í Miðvágs Róðrarfelag.

## Søgan

Vágabátarnir hava ikki vunnið nógv FM heiti, men teir hava heldur ikki verið heilt sørir. Sum fleiri ferðir áður nevnt, so gongur FM søgan í kappróðri aftur til 1964. Fram til og við 1972 varð í serstøkum róðri eftir ólavsøku kappast um FM. Síðani 1973 hevur skipanin við stigum, sum framvegis verður nýtt, verið galdandi.

8–mannafarið úr Miðvági var serliga tey fyrru árini oftast við í kappingini, og tað er ikki so langt síðani, at teir vunnu. Miðvingur var føroyameistari í 1988 og aftur í 1993. Burtursæð frá hesum báðum sigrunum hava vágamenn ikki vunnið nógv, síðani FM skipanin varð broytt í 1973. Men frammanundan vóru teir ikki sørir: Miðvingur vann í 1965, og Sørvingur, sum eisini var eitt 8–mannafar, vann í 1970. Um hetta mundi hevði kappróðurin í Sørvági tað heilt gott, tí dreingirnir umborð á Dúgvuni vunnu FM trý ár upp í slag – í 1969, 1970 og í 1971.

Hóast teir ikki hava luttikið í ár, so hava menninir í Vágum áður róð við fleiri bátum. Umframt Miðvingin kunnu vit nevna Fríggjarin, Sørvingin, Norðurstovu Dánjal og Sandavágsbátin.

Í gentukappingini hevur gingið betur hjá teimum í Vágum. Frúgvin úr Miðvági vann FM í fyrraárið, og Ørnin úr Sandavági hevur vunnið FM fimm ferðir. Dúgvan úr Sørvági og Beinta úr Miðvági eru kend kappróðrarnøvn. Og so er tað 6–mannafarið Riddarin úr Miðvági, sum hevur staðið seg so væl í ár. Tað kunnu vágafólk gleða seg um.

10–mannafarið er framvegis ein dreymur!

## Støðurnar í FM kappingunum eftir at fýra umfør hava verið

**5–mannafør dreingir**

| | |
|---|---|
| Fípan Fagra | 21 stig |
| Blikur | 18 stig |
| Sílið | 17 stig |
| Tjaldrið | 12 stig |
| Havfrúgvin | 12 stig |

**6–mannafør kvinnur**

| | |
|---|---|
| Jarnbardur | 28 stig |
| Páll Fangi | 18 stig |
| Riddarin | 18 stig |
| Gongurólvur | 12 stig |

**5–mannafør gentur**

| | |
|---|---|
| Sílið | 28 stig |
| Fípan Fagra | 19 stig |
| Blikur | 13 stig |
| Ørnin | 12 stig |

**6–mannafør menn**

| | |
|---|---|
| Smyril | 26 stig |
| Páll Fangi | 21 stig |
| Gongurólvur | 15 stig |
| Hvessingur | 12 stig |
| Strálan | 7 stig |
| Sølmundur | 7 stig |

**8–mannafør**

| | |
|---|---|
| Kvívíkingur | 26 stig |
| Argjabáturin | 22 stig |
| Knørrur | 16 stig |
| Húsavíkingur | 10 stig |

**10–mannafør**

| | |
|---|---|
| Eysturoyingur | 22 stig |
| Havnarbáturin | 19 stig |
| Vestmenningur | 19 stig |
| Klaksvíkingur | 16 stig |
| Nólsoyingur | 8 stig |

## Fýra FM vinnarar kunnu verða kosnir í dag

**Bara í kappingini millum dreingjabátarnar og tíggjumannaførini er eingin heilt greiður favorittur at vinna meistaraheitið**

FM KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*

Næstsíðsti kappróðurin í hesum róðrarárinum verður í Miðvági í dag. Talan verður um kapping á knapt eitt túsund metrum, og tað verður ivaleyst bæði tætt og spennandi.

Men longu undan næstsíðstu kappingini tykist tað vera greitt, at tað í dag verður gjørt av, hvør fer at vinna meistaraskapin í fýra av teimum seks kappingunum. Jarnbardur í kappingini millum 6–mannafør við kvinnum og Sílið í kappingini millum 5–mannafør við gentum hava fult stigatal. Jarnbardur er tíggju stig undan Páll Fanga og Riddaranum, og Sílið er níggju stig undan Fípuni Føgru. Tað vil við øðrum orðum siga, at eftir kappingina í dag verður munurin so mikið stórur frá Jarnbardi og Sílinum og aftur til hinar, at eingin teoretiskur møguleiki verður at taka tær aftur á ólavsøku.

Í kappingini millum 6–mannafør við monnum er Smyril heilt væl fyri. Teir hava fimm stig fleiri enn Páll Fangi. Tað vil siga, at tað verður ikki nóg mikið hjá Páll Fanga, um teir vinna bæði í dag og á ólavsøku. Um klaksvíkingar skulu vinna FM, so skal Smyril enda aftari enn nummar tvey, samstundis sum Páll Fangi vinnur báðar kappingarnar. Avrikini fyrr í summar siga, at hetta ikki er sannlíkt.

Í kappingini millum 8–mannaførini er treytin hjá Argjabátinum, at hann skal vinna bæði í dag og á ólavsøku. Um tað eydnast, so verður Argjabáturin FM vinnari. Um tað ikki eydnast, og um Kvívíkingurin stendur seg hampuliga væl, so verður Kvívíkingurin FM vinnari, og tað er møguleiki fyri, at FM heitið næstan fer at koma um Vestmannasund og til Kvívíkar í dag.

Í kappingini millum 10–mannaførini og 5–mannaførini við dreingjum er framvegis stórur spenningur, og hesar kappingarnar verða neyvan avgjørdar í dag. Hóast Fípan Fagra ikki hevur vunnið síðani á Skálafjørðinum, so eru klaksvíksdreingir framvegis á odda, men teir eru í harðari kapping við Blik, sum ikki enn hevur vunnið í ár, og við Sílið, sum hevur vunnið báðar kappingarnar, síðani teir vórðu kolldømdir á Skálafjørðinum.

Hjá 10–mannaførunum er púra opið. Eysturoyingur er framvegis fremstur, men munurin til Vestmenningin, sum vann í Vági, og Havnarbátin, sum í vikuni hevur verið í Miðvági og vant, er bara trý stig, og tað er einki at tosa um, tá havt verður í huga, hvussu stór kappingin hevur verið í summar. Klaksvíkingur hevur eina ferð verið nummar tvey í summar. Teir í Klaksvík droyma um at vinna ein 10–mannafars róður fyri fyrstu ferð í 32 ár. Nú eru bara tveir møguleikar eftir í ár.

Undir øllum umstøðum er lagt upp til sera spennandi kappróður seint seinnapartin í dag.



# B36 til Georgia í morgin

**Sunnudagin 14. juli fara greipuvinnararnir frá í fjør, B36, til Georgia til teirra higartil torførastu uppgávu í ár, tá Champions League dysturin móti goeorgisku meistarunum Torpedo Kutaisi mikukvøldið stendur á skránni**

CHAMPIONS LEAGUE
*Heini í Skorini*

Í morgin gongur leiðin hjá føroyameistarunum B36 til Georgia, har liðið mikukvøldið skal í eldin móti georgisku meistarunum Torpedo Kutaisi. Hetta verður uttan iva torførasta uppgávan hjá B36 í ár, tí umframt, at tað ikki hevur gingið væl í hond í landskappingini hjá greipuvinnarunum í ár, har liðið er á einum sætta plássi, liggur georgiska liðið sannførandi á odda í heimligu kappingini.

### Jens Kristian skaddur

B36 fær sostatt brúk fyri leikarum við nógvum altjóða royndum, og í hesum føri er tað sera óheppi, at sjálvur liðskiparin á A-landsliði okkara, Jens Kristian Hansen, ikki verður tøkur til dystin mikukvøldið. Royndi verjuleikarin hevur í longri tíð verið darvaður av skaða, og hann verður ikki klárur til Champions League dystin móti Torpedo Kutaisi. Hinvegin er at fegnast um, at ein annar føroyskur landsliðsleikari, Julian Johnsson, er komin aftur til felagi, og fær fyrrverandi Hull City leikarin uttan iva stóran týdning fyri B36 miðvøllin mikukvøldið.

Umframt Jens Kristian Hansen er annar rumenin á B36 liðnum, Din Sandu, framvegis uttanfyri við skaða, meðan langtíðarskaddu leikararnir Niels Joensen og Áki Mørk heldur ikki eru tøkir.

B36 spælir sum sagt mikukvøldið 17 juli í Georgia, meðan returdysturin verður 24 juli á Tórsvølli.

*Fyrrverandi Hull City leikarin Julian Johnsson skal leika sín fyrsta Europa Cup dyst fyri B36, og verður landsliðsleikarin uttan iva ein lyklaleikari á miðvøllinum móti Torpedo Kutaisi mikukvøldið*



# Bridge hildið uttanfyri

**Eftir frálíku úrslitini hjá bridge landsliðnum í Italia fyri stuttum, vísir Føroya Bridge Samband á, at bridge er einasta ítróttagrein í Føroyum, sum er útihýst á fíggjarlógini**

BRIDGE
*Heini í Skorini*



*Formaðurin í Bridgesambandinum, Mortan Rasmussen*

Føroya Bridge Samband hevur í tíðindaskrivi víst á, at ítróttagreinin ikki fær neyðugu sømdirnar frá myndugleikunum, og at mismunur verður gjørdur á ymsu ítróttagreinunum í Føroyum.

Sambært Føroya Bridge Sambandi er tað sligið fast við 10 tumma seymi, at bridge er ein ítróttagrein. Fyrrverandi formaðurin í IOC (olympisku komiteini), Samaranch, hevur skrivað undir hesa viðtøku. Hóast tað er bridge útihýst á fíggjarlógini, meðan bæði ÍSF, FSF og Talvsambamd Føroya standa á fíggjarlógini við rímiliga stórum upphæddum. Hetta hóast talvlandsliðið telir seks leikarar og bridgelandsliðið telur 16.

### Nei frá Mentamálastýrinum

Føroya Bridge Samband hevur fyrr gjørt vart við henda trupulleika, og í 1998 varð skrivlig umsókn sent Mentamálastýrinum. Fyrispurningurin um peningaligan stuðul varð noktaður, og hóast ein eingangsupphædd varð játtað til EM, er hetta als ikki nøktandi, um ítróttagreinin skal mennast og áhaldandi umboða Føroyar í altjóða høpi. Føroya Bridge Samband sendi aftur umsókn í 2001 við fyrispurningi um fasta upphædd á fíggjarlógini, men einki svar er komið úr Mentamálastýrinum.

Orsakað av góðu úrslitunum undir EM kappingini í Italia fyri stuttum, hevur Bridgesambandið fingið fleiri innbjóðingar úr øðrum londum, men higartil hevur føroyska bridgeleiðslan ikki verið før fyri at taka av innbjóðingunum orsaka av pengatroti. Sostatt verður ítróttagreinin isolera frá londunum kring okkum, hóast føroyska landsliðið hevur prógvað seg at kunna kappast á hægsta stigi.

# Sum í einum baðikari á 930,90 metrum

**Umstøðurnar at rógva verða í Miðvági sagdar at vera framúr, og har vesturi halda teir seg kunna rokna við, at tað fer at ganga eins væl hesa ferð, sum tað gjørdi fyri fýra árum síðani**

UMSTØÐUR AT RÓGVA KAPP
*Jóannes Hansen*

Formaðurin í Róðrarsambandinum minti fyri ikki so langt síðani á, at tað er í Miðvági, at teir eiga metið, tá tað ræður um at fáa kappróðrarnar skjótt avgreiddar. Tá vestanstevnan var í Miðvági fyri fýra árum síðani, vóru tað bara ein tími og seks minuttir frá tí, at startskotið brast fyri fyrsta róðrinum og inntil síðsti róðurin var liðugur.

Í Miðvágs Róðrarfelag er manningin ikki tann sama, sum hon var fyri fýra árum síðani. Sambært formannin er talan um nýtt, ungt og harvið óroynt fólk at skipa fyri kappróðrinum. Men formaðurin, Hans Jákup Jacobsen, letur væl at, at tey hava fingið góða hjálp og vegleiðing frá teimum, sum so ofta hava verið við.

Formaðurin stúrir ikki fyri kappróðrinum. Heldur sigur hann seg gleða seg. Tá vit tosaðu við hann hóskvøldið var alt mest sum klárt.

Sum vit áður hava sagt, so verður fyrsti róðurin ikki fyrrenn klokkan fimm í dag. Teir bíða eftir sjóvarfallinum. Miðvingar við innliti í umstøðurnar hava sagt, at tað ber ikki til at rógva, fyrrenn tað er hálvfløtt, og tað er tað klokkan fimm. Tá verður ungdómsróðurin, har fimm manningar skulu taka lut. So verða teir seks FM róðrarnir.

Allar kappingarnar eru á túsund metrum verður sagt. Men tað er ikki heilt rætt. Sambært formanninum í Róðrarsambandinum, Hannisi Joensen, hevur Matrikulstovan mált kappróðrarmálið á Miðvági at vera 930,90 metrar. Tað vil siga, at málið er 29 metrar longri enn málið er á ólavsøku, tá tað verður kappast á 901,31 metrum.

Er tað soleiðis, at bátarnir rógva seg upp á sandin, tá teir koma á mál, spyrja vit Hans Jákup Jacobsen, og hann svarar soleiðis:

– So galið er tað ikki. Manningarnar nýtast ikki at stúra fyri, at bátarnir fara at standa. Men tær mugu ansa sær. Hetta skal skiljast soleiðis, at tað ber ikki til, sum tað ofta sæst, at bátarnir reka langt inn um málið. Tá bátarnir eru farnir gott og væl inn um málið, mugu teir skjóta eitt sindur á og so ansa sær, tá teir takka hvørjum øðrum fyri róðurin og rópa hurrá.

Tá vit tosa um umstøðurnar at rógva innanfyri grótkastið, sum stingur úr Húsalandinum innanfyri Giljanes, so heldur formaðurin í róðrarfelagnum í Miðvági, at tað ber illa til at finna betri umstøður:

– Tað valdast sjálvandi fyrst og fremst um veðrið, sum vit einki kunnu gera við. Men annars eru umstøðurnar sera eins uttan mun til, hvar bátarnir liggja. Tað er ikki soleiðis, at teir, sum eru uttast ella innast, hava meiri ella minni viðrák ella mótrák. Tað er so at siga sum í einum baðikari, og vit tora at siga, at fasti starturin verður góður og beinur. Tað verður hann, tí vit hava hava spent ein trossa frá Prestlandinum og yvir á Húsalandið. Hann er festur við kongum, sum eru stoyptir fastir. So er hann spentur við taljum, og so seta vit skeklar í. So hann skuldi verið rimmar fastur, og harafturat hava vit teymar inn í grótkastið, so eingin bugur skuldi komið í.



*Vestanstevnu kappróðurin verður fluttur tveir tímar í mun til tað, vanligt er á summarstevnum, orsaka av sjóarfallinum. Róð verður klokkan fimm seinnapart. Fjøra er klokkan trý, og tá er turt rættiliga langt út á vágna.*

*Mynd: Edvard Joensen*

Ætla tit at gera skjótari av enn fyri fýra árum síðani?

– Tað er einki mál í sær sjálvum. Men tað átti ikki at verið ómøguligt, um alt lagar seg væl. Ta ferðina róðu genturnar tveir kvalifiseringsróðrar, áðrenn tær róðu finalu. Hesa ferð verður bara ein genturóður, men so verður ein ungdómsróður eisini. Smyril er settur at fara avstað aftur klokkan 19. Tá rokna vit við, at steypahandanin verður av. men stingur okkurt óvæntað seg upp, so rokna vit við, at Smyril lagar seg eftir tí. Hetta er jú ein kappróðrartúrur burturav hjá honum. Men vit fara at gera okkara besta. Róðrarmanningarnar og teir í Róðrarsambandinum hava fyrr í summar víst, at tey duga síni ting.

Miðvingar borðreiða fyri róðrarfólkunum í kantinuni á Fiskavirking í Miðvági. Har fara róðrarfólkini at fáa skerpikjøt og annan góðan føroyskan viðskera, áðrenn tey fara at seta á teir 930 metrarnar.